# 360° søkir skrivstovunæming

Til skrivstovu okkara á Hjalla verður søkt eftir skrivstovunæmingi, at byrja skjótast gjørligt.

Umsøkjari við FHS ella HH prógvi hevur fyrimun. Vit bjóða eitt lærupláss við góðum arbeiðsumhvørvi og fjøltáttaðum uppgávum.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Fróða Sigvardsen á tlf. 510808.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum og møguligum ummælum er 27. august 2007.

**Umsókn skal sendast til:**

Sp/f 360°
Á Hjalla 2-4
Boks 3268
110 Tórshavn
Att: Fróði Sigvardsen

360°
Á Hjalla 2 · 188 Hoyvík · Tel 360 360
Fax 360 361 · 360@360.fo

Vágs Kommuna

## SØKIR
## Reingerðingsfólk/avloysarar

Søkt verður eftir einum reingerðingsfólki/avloysara til Frítíðarskúlan í Vágs kommunu at byrja skjótast tilber.

**Setunartreytir:**
Talan er um reingerðing 2 tímar um dagin, og at verða avloysari fyri starvsfólkið í barnaansingini.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfeløg.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen tlf. 373024/228718.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 3. september 2007.

Umsóknin skal sendast til:

**VÁGS KOMMUNU**
FO-900 VÁGUR
Viðm. reingerðingsfólk/avloysari




# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Viðareiðis skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at byrja 1. september 2007.**

**Søkt verður eftir:**
- Einum lærara á umleið 20 – 24 tímar um vikuna

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í:**
- donskum í 3. flokki
- støddfrøði í 4. og 5. flokki
- føroyskum og náttúru/tøkni í 6. og 7. flokki
- tónleiki
- serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Løn**
Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsókn**
Umsókn við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 28. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid

# Frá Svínoyar Kommunu

27. august, verður fólkaatkvøða, um samanlegging ímillum Klaksvíkar og Svínoyar Kommunur, frá kl. 13.00 til 16.00, í lærarahúsinum.

Borgarar í Svínoyar Kommunu, kunnu frá 21. til 23. august greiða brævatkvøðu á hesum støðum, Klaksvíkar Kommuna, Miðlan, Tórshavnar Kommuna, Snarskivan og í Svínoy, við at venda sær til valnevndina.

**Svínoyar Kommuna**

Vágs Kommuna

# KUNNGERÐ UM RUDDING

Vágs kommuna hevur avgjørt at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1 stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 1. september 2007, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**VÁGS KOMMUNA**
**OG**
**SÝSLUMAÐURIN**

# Avloysari - køkshjálp

Søkt verður eftir einum avloysara frá 27. aug. til 30. sept. Uppgávan er matgera, pakka døgurðar og vaska upp. Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl. uml. 10-14.

*Keypmaðurin "úti í Grønlandi"*
*JOHANNES ANDREASEN*
Pf. Johannes Andreasen · Grønlandsvegur 16
Tel. 31 20 87 · ja@post.olivant.fo

# Kassafólk

Søkt verður eftir fólki at passa kassan og fylla vørur upp fyrrapartar og seinnapartar, aðruhvørja viku og annanhvønn leygardag, at byrja beinanvegin ella smb. avtalu.

*Keypmaðurin "úti í Grønlandi"*
*JOHANNES ANDREASEN*
Pf. Johannes Andreasen · Grønlandsvegur 16
Tel. 31 20 87 · ja@post.olivant.fo